FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 26. september 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar : | Sigurð í Jákupsstovu, Hans Pauli Joensen, Turið Sigurðardóttir, Hans Andrias Sølvará og Jørgen Meitilberg |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 26. september 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Fíggjarætlan 2017**

Setrið hevur sent MMR eitt uppskot til Fróðskaparsetur Føroya fyri 2017. Í uppskotinum um fíggjarlóg fyri 2017 hevur Fróðskaparsetur Føroya fingið tillutað eina nettoútreiðslujáttan á 84.466 tús. kr. við lønarframskrivingum. Játtanin í 2016 er so statt framskrivað við til samans 4.651 tús. kr. í mun til 2016.
Farið verður, í næstum, undir at gera fíggjarætlan býtt á deildir og fyrisitingarligar eindir.

2. **Val av stýrislimum**

Setanarskeiðið hjá stýrinum fyri Fróðskaparsetrið gongur út 31. desember 2016. MMR hevur heitt á Setrið, um at skipa fyri vali av limi og varalimi fyri starvsfólk og lesandi í stýrið.
Valreglurnar fyri stýrisvalið eiga at verða dagførdar skjótast gjørligt, soleiðis at adjunktar og ph.d. lesandi komu í bólkin av starvsfólkum. Ein tílík broyting má góðkennast av stýrinum millum funda.
Leiðslan umrøddi at valið verður mikudagin 16. november. Dekanarnir umrøða valið á næstkomandi deildarfundi. Ein valbólkur skal setast at skipa valið. Valbólkurin verður mannaður við fyrisitingarstjóra og einum umboði fyri hvørja megindeild.

3. **Samstarv við TK**

Samstarvsavtala við Tórshavnar kommunu. Ætlanin er at skipa fyri einari verkstovu fyri 10 starvsfólk frá Setrinum og 10 frá TK, har ætlanin er at hugaroka um møgulig samstarvsøki. Eftir ætlan verður fundurin 26. oktober 2016. Dekanarnir taka málið upp á komandi deildarfundi.

4. **Mannagongd fyri lesandi við skerdum lestrarførleikum**

HPJ hevur gjørt viðmerkingar til uppskotið til mannagongd. JJ sendir JM viðmerkingar eftir fundinum. Viðmerkingarnar verða gjøgnumgingnar og mannagongdinløgd fram á komandi leiðslufundi.

5. **Heystveitsla 2016**

Ynskiligt er at seta eina trivnaðarnevnd at taka sær av tiltøkum á Setrinum.

/JM